## UTTAN ÚR HEIMI

## Hava álit á Russlandi

Tá russisku myndugleikarnir í summar fóru í hernað ímóti stóra oljufelagnum Yukos og stjóra tess, Mikhail Khodorkovskij, roknaðu búskaparfrøðingar við, at útlendski fíggjarheimurin fór at venda Russlandi bakið.

Men so er ikki. Eitt yvirlit yvir útlendsku íløgurnar í Russlandi í juli-ársfjórðingi vísir, at útlendingar gjørdu íløgur fyri 8,2 milliardir amerikanskar dollarar í Russlandi frá juli til oktober. Tað merkir, at útlendsk feløg og einstaklingar hava gjørt íløgur fyri næstan 21 milliardir dollarar í Russlandi frá nýggjárinum til 1. oktober, og tað eru heili 62 prosent meiri enn í somu mánaðum í fjør. Flestu útlendsku íløgupengarnir koma úr Týsklandi, USA, Kýpros, Bretlandi, Fraklandi og Niðurlondum.

Óheftir búskaparfrøðingar siga, at tað eru tær stóru útlendsku íløgurnar, sum gera, at framburðurin í russiska búskapinum framvegis er stórur. Stjórnin í Moskva roknar við, at búsksparvøktsurin verður 6,6 prosent í ár. Hinvegin hava russarsjálvir ikki so stórt álit á landsins búskapi og myndugleikum. Í hvussu er hava teir flutt nógvar milliardir dollarar av landinum.

## Vænta gott val

Um tríggjar vikur verður val í Norðurírlandi, og í politiska vonginum hjá IRA, Sinn Fein, vænta tey, at flokkurin fer at fáa eitt gott úrslit.

Formaðurin í Sinn Fein, Gerry Adams, sigur við NTB, at sambært einari veljarakanning hjá blaðnum Sunday Times fer flokkur hansara fram um tann hóvliga flokkin SDLP, sum eisini er katólskur, og sum eisini er fyri tættari sambandi ímillum Norðurírland og Írland eins og Sinn Fein. Sjálvur stillar Gerry Adams upp í vestara partinum av Belfast. Har fekk Sinn Fein fýra umboð á valinum seinast, og floksformaðurin vónar at fáa eitt umboð afturat hesaferð. Tað er lítil ivi um, at formaðurin verður afturvaldur, men tað er ikki vist, at hann fer at fáa flestar atkvøður. Næstformaðurin í Sinn Fein, Martin McGuinness, sigst hava gjørt sera nógv burtur úr valstríðnum hesaferð.

Fyrrverandi fyrstiráðharrin David Trimble, sum er talsmaður fyri at varðveita Norðurírland sum part av bretska ríkinum, segði um vikuskiftið, at hann er ikki sinnaður at skipa stjórn saman við Sinn Fein, fyrr enn IRA hevur prógvað, at felagsskapurin hevur beint fyri øllum sínum vápnum.

## Bilurin er ov tungur

Orsakað av veksandi vandanum fyri yvirgangi hevur norska stjórnin gjørt av at keypa Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra ein nýggjan og tryggari bil.

Valið fall á ein BMW. Bilurin er klæddur við sterkum stáli og hevur sjálvandi skottryggar rútar. Harafturat er trygdarútgerð av ymsum slagi í honum. Men alt hetta hevur gjørt, at bilurin hjá forsætisráðharranum vigar umleið fýra tons, og tað hevur elvt til trupulleikar, tí ein so tungur persónbilur hevur ikki loyvi at koyra á teimum norsku vegunum.

Kunningarstjórin í forsætismálaráðnum, Øivind Østang, sigur við blaðið VG, at bilurin vigar 40 kilo ov nógv. Av tí at tað er BMW-verksmiðjan, sum hevur gjørt bilin og trygdarútgerðina í honum, er tað eisini BMW, sum skal gera tær neyðugu broytingarnar, so bilurin lýkur norska lógarkravið. Ætlandi fer tað at taka einar fjúrtan dagar at fáa tann nýggja forsætisráðharrabilin góðkendan, skrivar VG.

## Filmur um ríkmann

Amerikanska filmsfelagið Crystal Sky hevur keypt rættindini til at gera ein film um bretska ríkmannin Richard Bran son.

Filmurin skal gerast eftir bókini "Loosing my virginity", sum er ævisøgan hjá Richard Branson. Í bókini skrivar hann, hví hann valdi at gevast tíðliga í skúlanum, og hvussu tað eydnaðist honum at gerast ein av heimsins ríkastu handilsmonnum. Hann var ikki meiri enn gott tjúgu, tá hann stovnaði plátufelagið Virgin, sum hann í 1992 seldi fyri eina milliard dollarar. Hann hevði eisini sítt egna flogfelag, Virgin Atlantic Airways, sum hann stovnaði í 1984.

Crystal Sky ætlar at fara undir filmin næsta ár, og felagið leitar nú eftir einum at standa fyri framleiðsluni, skrivar NTB.



*Eduard Sjevardnadse valdi at fara frá heldur enn at leiða Georgia út í eitt blóðbað*

# Hevði einki annað val

**Georgiski forsetin, Eduard Sjevardnadse, valdi sunnudagin at fara frá, men hann hevði heldur einki í at velja.**

GEORGIA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eitt tíðarskeið endaði seinnapartin sunnudagin, tá georgiski forsetin, Eduard Sjevardnadse, kunngjørdi, at hann hevði lagt frá sær. Frágreiðingin var sambært honum sjálvum, at fór hann ikki frá, fór tað at enda í einum blóðbaði.

Men í veruleikanum hevði forsetin einki í at velja, siga eygleiðarar í georgiska høvuðsstaðnum Tblisi. Tá Sjevardnadse fyri trimum vikum síðani kunngjørdi úrslitið av tjóðartingsvalinum, misti fólkið álitið á honum, tí tað var øllum greitt, at tað almenna valúrslitið var úrslit av umfatandi sviki. Andstøðan kravdi forsetan frá, og tá partar av herinum og løgregluni um vikuskiftið søgdu seg styðja andstøðuna, hevði forsetin einki í at velja.

Tann royndi Sjevardnadse vann sær stóra virðing kring heimin, tá hann sum sovjetskur uttanríkisráðharri hjá Mikhail Gorbatjov var við til at gera enda á kalda krígnum. Men hansara forsetatíð í Georgia hevur roynst illa. Fyri tíggju árum síðani var Georgia ein tann mest múgvandi parturin av Sovjetsamveldinum. Í dag er lønin sum í menningarlondunum, og stórur partur av fólkinum hevur livikor, sum eru niðan fyri hungursmarkið.

# Skrivaði kærleiksbrøv til 12 ára gamlan drong

**Amerikanska løgreglan sigur seg hava funnið fleiri kærleiksbrøv, sum tónleikastjørnan Michael Jackson hevði skrivað einum 12 ára gomlum drongi.**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært amerikanska sjónvarpinum Court-TV og bretska blaðnum Daily Mirror funnu løgreglumenninir brøvini, tá teir fyri nøkrum døgum síðani rannsakaðu húsini hjá Michael Jackson, Neverland.

Sambært sjónvarpinum og blaðnum vóru brøvini stílað til tann 12 ára gamla Gavin Arvizo, sum hevur skuldsett Michael Jackson fyri kynsligan ágang. Tað var hansara skuldseting, sum fekk løgregluna at rannsaka húsini hjá tónleikastjørnuni.

Tann 12 ára gamli drongurin hevur sagt løgregluni, at Michael Jackson skrivaði honum fleiri kærleiksbrøv og yrkingar. Tey hevur løgreglan nú funnið, skrivar Daily Mirror, sum eisini veit at siga, at løgreglan hevur lagt hald á fleiri sjónbond, sum vórðu funnin heima hjá Michael Jackson.

Sjálvur var Michael Jackson ikki heima, tá løgreglan rannsakaði hús hansara. Seinni gav hann seg yvir til løgregluna, men hann varð latin leysur ímóti næstan 20 milliónum krónum í veðhaldi.





# Krás og krákutónar

**Dragandi og deilig. Mediterandi og melankolsk. Frá teski til torusláttur. Eivør Pálsdóttir leveraði aftur vøruna við fullari innliving, tá hon fyri fullsettum Norðurlandahúsi sang, spældi og legði nýggju fløgu sína Krákan fram fyri føroyingar sunnudagin**

KONSERT

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Eina tíð hevur hon búleikast í Íslandi og funnið stevið saman við sínum íslendska bólki, ið er mannaður við Pétur Grétarsson, Birgir Bragason og Eðvarð Lárusson. Tey eru samanspæld. Eivør er fangandi í fokus, og bólkurin syrgir fyrst og fremst fyri at stuðla uppundir hennara løg og víðfevndu rødd við stemningsfullum undirspæli.

Eivør hevur vunnið hjørtuni hjá íslendingum, sum eru ovfarnir av hennara talenti. Vit kunnu bara taka undir við teimum. Hon er eitt náttúrubarn og sangsnillingur, og tað vistu vit longu av.

Tað var flog yvir Eivør í Norðurlandahúsinum. Tað tók eina løtu, áðrenn hon kom á pallin. Høgt omanyvir okkum hoyrdu vit hennara sveimandi rødd, so vit spakuliga vandust við tað serliga eivørska universið. So kom hon, og fólk fagnaðu henni fyri líkasum at geva hennara eina viðurkenning fyri tað, hon hevur útint síðan seinast.

Frá byrjan var hon ein fuglur, klødd í einum hvítum hami, sum er seymaður upp á hana. Eivør hevði veingir, og á pallinum hingu eisini fleiri uppblást flogfør, sum helst vóru ein skemtilig tøkk til føroyska flogfelagið fyri eitthvørt. Men Eivør er jú eisini framvegis serføroysk, hóast hon hevur víst sínar dygir aðrastaðni eina tíð.

Skjaldrini seta framvegis dám á tónasmíðið. Gomlu munnbornu rímurnar, sum vórðu njóraðar fyri børnum, hoyrast sjálvandi mest aftur í løgunum Krákan og Rura barnið, men eisini aðrastaðni hómast íblásturin frá bæði kvæðum og Kingo.

Konsertin er sonevnd »promotion« fyri fløguna, sum er eitt vet meiri krevjandi enn hennara fyrsta. Eivør mennist, og skalt tú dáma tað, er næstan neyðugt, at tú fylgir við hennara menning. Í støðum er tað øgiliga stilt og seinført, aðrastaðni hart og ágangandi. Hetta er ikki musakkur, men gevur tú tær stundir, so verður tú væl løntur.

Fyrra fløgan hevði fleiri løg enn hendan, sum fangaðu beinanvegin. Løgini, sum fara at vinna flest hjørtu á Krákuni eru óivað Hjarta mítt, sum er sera einfalt og vakurt. Tað nærmasta vit koma einum hitti. Rósufarið verður óivað eisini spælt á útvarpsstøðum, og á hesum løgum kemur styrkin hjá Eivør rættiliga fram. Einfaldi bygnaðurin í løgunum, ið minna okkum á Hanus Johansen, gevur henni rásarúm at leggja allar kenslur í.

Á konsertini var lagið Brostnar borgir, sum Eivør skrivaði tann 11. september, tann sterkasta upplivingin. Ta løtuna var Eivør sum fuglurin Fønix, ið reis aftur úr øskuni og gjørdist vónin, sum fekk heimin at síggja, at tað altíð eru glottar. Við sínum serki, líktist hon einari tølandi nonnu við rockgittara, ið bæði fyrigav, revsaði og elskaði alt í senn.

Á konsertini hevði Eivør fyri fyrstu ferð tveir kórsangarar og ein cellospælara, Høgna Reistrup, við sær, og tað gjørdist hon ikki verri av.

Óneyðugt er enn einaferð at leggja dent á ótrúliga sangkunnleikan hjá Eivør. Hon er bara. Vit bíða longu spent eftir næsta leiki.